## Spania vann Davis-Cup

Sponsku tennis-harrarnir kunnu aftur í ár rópa seg heimsins bestu, eftir at teir hava vunnið Davis Cup-finaluna móti Kekkia. Rafael Nadal og Daved Ferrer vnnu fríggjdagin sínar dystir í einmansleiki, og leygardagin vunnu Lopez/Verdasco á7-6, 7-5, 6-2 á Berdych/Stepanek í tvímansleikinum. Við hesum hevði Spania vunnið teir kravdu tríggjar dystirnar, og samstundis gjørdist landið tað fyrsta síðani 1998 at endurvinna Davis Cup-heitið.



## Canal9 tekur HM-dystir

Hetta er gjørligt, tí tað er ikki møguligt hjá stóru donsku rásunum at senda allar dystirnar, sum verða spældir í Suðurafrika komandi summar. Leygardagin boðaði umboð frá Canal9 frá, at teir hava keypt sær rættindi til 21 dystir. Millum annað allar dystirnar hjá Argentina í bólkaspælinum, tveir av dystunum hjá Brasil og teir dystirnar í danska bólkinum, har Danmark ikki spælir.Hartil verður roknað við, at dystir hjá Týsklandi og Onglandi eisini koma á skíggjan hjá Canal9.

# Afturstig...



Hilmar Jan Hansen

Kappingarreglurnar hjá teimum vaksnu í flogbólti fevna um tilsamans 24 greinir og viðgera alt tað, sum undir vanligum umstøðum kann henda í sambandi við kapping og einstakar dystir. Tí er sera umráðandi, at feløgini til fulnar kunna seg um tað, sum stendur á pappírinum, so sleppast skal undan mistøkum og gáloysni, ið kostar.

Kortini slepst ikki undan, at feløgini onkuntíð traðka við síðuna av, og tá kann tað kosta. Sum nú um vikuskiftið, tá Mjølnir fekk útidystin ímóti ÍF fluttan frá sunnudegi til fríggjakvøld, men bara ikki hevði givið sær far um, at Flogbóltssambandið bæði skuldi hava eina fráboðan um flytingina – og góðkenna hana!

Fráboðanina fekk Flogbóltssambandið ongantíð, so tí var flytingin slett ikki viðgjørd á rætta stað og ei heldur góðkend. Revsingin kom longu leygarkvøldið, tá Flogbóltssambandið boðaði frá, at hvørki liðið fekk nakað stig fyri dystin, ið er kolldømdur, men at bæði skulu rinda 1.600 krónur í bót í part.

Flogbóltssambandið hevði neyvan heldur góðkent eina fráboðan um at flyta henda dystin, tí hóast tað stendur í kappingarreglunum, at »starvsnevndin í FBF kann gera undantøk frá hesi reglu«, verða slík undantøk bert givin í heilt serligum førum. At onkur spælari skal til jólaborðhald, verður neyvan roknað sum eitt heilt serligt føri…

Sum skilst, fara hvørki ÍF ella Mjølnir víðari við málinum, men tað fáa vit so at síggja. Í øllum førum er tað gott, at Flogbóltssambandið – sum tað eisini hevur gjørt fyrr – ger skjótt av og sker út í papp, at kappingarreglurnar ikki bara eru til til stuttleikar, men skulu takast í fullum álvara. Hendir hetta aftur, er revsingin uppaftur harðari, tí tá verða liðini koyrd úr kappingini, so helst fer hetta mál at gera sítt til, at øll feløg nú væl og virðiliga seta seg inn í reglurnar, hava tey ikki gjørt tað áðrenn.

Í fyrsta umfari sær málið ikki út til at kosta Mjølnir so nógv á stigatalvuni. Hóast klaksvíkingar vunnu dystin og skuldu fingið tvey stig, høvdu hesi bæði beinanvegin farið niður í helvt, tí nú er kappingin hjá monnunum hálvrunnin. Men hendir tað, at tvey av hinum mansliðunum í síðsta enda yvirhála Mjølnir, verður mista stigið ikki bara eitt mist stig, men eitt veruligt afturstig, ið kostar meira enn bótina!

# Kaká, Ronaldo og Drogba í krúttunnu




**Súðini gjøgnum áskoðarafjøldini vóru øgilig, so hvørt sum nøvnini á londunum í bólki G komu upp á talvuna**
Mynd: Polfoto/AP

**Bólkur G við Brasil, Portugal og Fílabeinsstrondini fekk alt fyri eitt heitið, dynamitt-bólkurin, tá lutakastið til bólkaspælið í HM-endaspælinum í fótbólti var á skránni fríggjadagin**




Jákup Mørk

Fríggjadagin seinnapart vórðu seðlarnir drignir úr pottunum, soleiðis at bólkarnir til HM-endaspælið í fótbólti kundu setast saman.

Stóra yvirskriftin varð alt fyri eitt sett á bólk G, sum á pappírinum líkist eini sannari krúttuni, har Norðurkorea er ífyllan. Brasil, Portugal og Fílabeinsstrondin er samstundis ein uppgerð millum Kaká, Ronaldo og Drogba, sum allir tríggir verða roknaðir millum avgjørt bestu spælararnar í heiminum.

Hartil inniheldur bólkurin eisinis søgulig perspektiv, nú Portugal skal royna seg móti fyrrverandi hjálandinum, Brasil.

### Danir ivasamir

Í Danmark var fagnaðurin ikki tann heilt stóri um lutakastið, tó at hetta eisini kundi verið verri.

Eitt er, at Holland er í bólkinum, men samansetingin var hóast alt soleiðis, at eitt av toppseedaðu liðunum skuldi í hvønn bólkin.

Tað, sum Morten Olsen dámdi verri, var, at Danmark ikki slapp undan afrikanskari mótstøðu. Nú talan er um fyrsta HM-endaspælið í afrikanska kontinentinum, verður roknað við, at afrikonsku londini hava okkurt slag av fyrimuni av umstøðunum. Ikki minst í Johannesburg, har tunn luft og nógvur hiti gera sítt til at umstøðurnar eru sera truplar.

Hinvegin vóru tey í Onglandi ovurfegin, tá tey fingu USA, Algier og Slovenia í sín bólk. Á pappírinum er talan væl og virðiliga um yvirkomuliga uppgávu bretum, sum við Capello tykjast hava fingið ein landsliðsvenjara, sum hevur tendrað vónina um, at HM-heitið loksins aftur kann finna fram til landið, sum uppfann fótbóltin.

## FAKTA

**Bólkur A**
Suðurafrika
Mexico
Uruguay
Frakland

**Bólkur B**
Argentina
Nigeria
Suðurkorea
Grikkaland

**Bólkur C**
Ongland
USA
Algier
Slovenia

**Bólkur D**
Týskland
Australia
Serbia
Ghana

**Bólkur E**
Holland
Danmark
Japan
Cameroun

**Bólkur F**
Italia
Paraguay
New Zealand
Slovakia

**Bólkur G**
Brasil
Norðurkorea
Fílabeinsstrondin
Portugal

**Bólkur H**
Spania
Schweitz
Honduras
Chile